LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Tórshavn: 10. desember 2019
J. nr.: 0605-004/16-109
Viðgjørt: KTH

Ummælisskjal

1. Í hesum ummælisskjalið eru viðmerkingarnar frá ummælispørtunum viðgjørdar. Fleiri ummælispartar vísa á somu viðurskifti, og tí eru viðmerkingarnar bólkaðar í evni.

Ummælisskjalið er uppbygt á tann hátt, at fyrst eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd (pkt. 2-8), síðani viðmerkingar til ávísar partar av uppskotinum í kronologiskari rekkjufylgju (pkt. 9-18), og at enda ítøkiligar viðmerkingar, sum ikki eru fevndar av punktunum frammanundan umframt málsligar viðmerkingar (pkt. 19-20).

2. Fiskimálaráðið, **Umhvørvis- og vinnumálaráðið**, **Fíggjarmálaráðið**, **Landssjúkrahúsið** og **LÍV** hava ongar viðmerkingar.

Almannamálaráðið, **Uttanríkis- og mentamálaráðið**, **Klaksvíkar kommuna** og **Arbeiðs- og brunaeftirlitið** taka undir við uppskotinum.

Flestu ummælispartar, herundir **Granskingarráðið**, **Fróðskaparsetur Føroya**, **Ílegusavnið**, **BankNordik**, **Betri**, **Faroe Law**, **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu**, **Fólkaheilsuráðið**, **Felagið Føroyskir Grannskoðarar**, **Føroya Arbeiðsgevarafelag**, **Kommunufelagið**, **Heilsumálaráðið** og **Familjufyrisitingin** taka í høvuðsheitum undir við uppskotinum, og at galdandi persónsupplýsingarlóg verður dagførd. Fleiri ummælispartar, t.d. **Felagið Føroyskir Grannskoðarar** og **Ílegusavnið**, vísa á tydningin av, at Føroyar varðveita ES-góðkenningina sum trygt triðjaland.

Eisini vísa fleiri ummælispartar á týdningin av, at Føroyar fáa lóggávu, sum er í trá við lóggávuni í ES. M.a. **BankNordik** vísir á, at GDPR er vorðin altjóða standardurin fyri dátuverju og metir ikki, at serføroysk viðurskifti eru, sum gera tað neyðugt at víkja frá hesum standardi.

Dátueftirlitið tekur undir við, at persónsupplýsingarlógin verður dagførd, men metir ikki tørv vera á eini nýggjari lóg.

3. Løgtingslóg grundað á ES-rætt
Dátueftirlitið vísir á løgfrøðiligar avbjóðingar við, at tað í lógaruppskotinum verður víst til ásetingar í GDPR. Dátueftirlitið vísir á, at føroysk rættarstøða ikki eigur at verða læst føst í mun til galdandi ES-rætt, og at tað er umráðandi, at siðvenjan sambært lógini kann mennast í mun til føroysk viðurskifti.

Dátueftirlitið er harafturat av teirri fatan, at høgu sektirnar og Evropeiska Dátuverndarráðið (EDPB), sum verður upprættað við GDPR, eru nýbrotini við fyriskipanini, og at tað tí, tá hetta ikki er við í føroyska uppskotinum, er villeiðandi at vísa til, at GDPR verður sett í gildi í Føroyum.

Spurningurin um umsiting av lógini er umrøddur í pkt. 1.4.14 í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið. Har er m.a. greitt frá, at tað er Dátueftirlitið, sum er myndugleiki á økinum, sum eins og í dag hevur ábyrgdina av at nágreina innihaldið í løgtingslógini. Dátueftirlitið skal tí í ítøkiligum málum og almennum vegleiðingum o.a. leggja fast, hvussu løgtingslógin skal tulkast. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at Dátueftirlitið í hesum arbeiði eigur at hava í huga, at landsstýrið og Løgtingið við hesum løgtingslógaruppskoti hava lagt upp til, at rættarstøðan í Føroyum og ES so vítt møguligt skal vera eins.

Hesin lóggávuháttur merkir ikki, at Dátueftirlitið er bundið av t.d. tulking frá ES-dómstólinum ella at føroysk lóggáva verður læst føst í mun til galdandi ES-rætt. GDPR verður ikki sett í gildi í Føroyum. Lógaruppskotið er ein føroysk løgtingslóg, sum í høvuðsheitum byggir á sama grundarlag, sum GDPR.

Løgmansskrivstovan metir tað hava praktiskan týdning, serliga fyri fyritøkur, sum samskifta nógv við fyritøkur í ES-londum, at tað í serligu viðmerkingunum er víst til, hvørja grein í GDPR ein áseting svarar til. Av tí, at ivi møguliga kann stinga seg upp um, hvussu tilvísingarnar til GDPR skulu skiljast, hevur Løgmansskrivstovan valt at broyta serligu viðmerkingarnar, so at tað ikki verður víst til, at ein áseting "svarar til" eina grein í GDPR, men at ásetingin "byggir á innihaldið í" eini ávísari áseting í GDPR.

Um EDPB er at viðmerkja, at ráðið er samansett av leiðandi starvsfólkum fyri dátueftirlitini í ES-limalondunum. Ráðið kom í staðin fyri sokallaða artikkul 29-bólkin, sum eisini var settur saman av umboðum fyri dátueftirlitini í ES- limalondunum, og sum var upprættaður sambært artikkul 29 í direktivinum um dátuvernd frá 1995. EDPB hevur m.a. til uppgávu at gera vegleiðingar o.a. til GDPR. Føroyska Dátueftirlitið kann í sínum arbeiði við løgtingslógini – í tann mun tað verður mett relevant – taka vegleiðingar frá EDPB við í sítt arbeiði.

4. Endurskoðan av GDPR í mai 2020

Dátueftirlitið vísir á, at GDPR skal endurskoðast í seinasta lagi í mai 2020, og at ein nýggj dátuverndarlóg grundað á GDPR undir ongum umstøðum eigur verða løgd fyri Løgtingið, fyrrenn fyriskipanin er endurskoðað av ES.

Artikkul 97 í GDPR er soljóðandi:

> *1. Senest den 25. maj 2020 og hvert fjerde år derefter forelægger Kommissionen Europa-Parlamentet og Rådet en rapport om evaluering og revision af denne forordning.*
> *2. I forbindelse med de i stk. 1 omhandlede evalueringer og revisioner undersøger Kommissionen navnlig, hvordan følgende anvendes og fungerer:*
> *a) kapitel V om overførsel af personoplysninger til tredjelande eller internationale organisationer, særlig med hensyn til afgørelser vedtaget i henhold til denne forordnings artikel 45, stk. 3, og afgørelser vedtaget på grundlag af artikel 25, stk. 6, i direktiv 95/46/EF*
> *b) kapitel VII om samarbejde og sammenhæng.*
> *3. […]*
> *4. […]*

> *5. Kommissionen forelægger om nødvendigt relevante forslag til ændring af denne forordning, navnlig under hensyntagen til udviklingen inden for informationsteknologi og i lyset af fremskridtene i informationssamfundet.*

Sambært hesi áseting verður høvuðsfokus í eftirmetingini og endurskoðanini av GDPR kapittul 5 um flutning til triðjalond, herundir serliga avgerðir um trygg triðjalond, og kapittul 7 um samstarv og samanhang.

Kapittul 6 í lógaruppskotinum byggir á sama struktur, sum kapittul 5 í GDPR. Hetta er sami strukturur, sum eisini var í reglunum um flutning til triðjalond í ES-direktivinum frá 1995. Tað er tí lítið sannlíkt, at struktururin verður broyttur munandi. Væntandi verður dentur lagdur á endurskoðanina av triðjalandsgóðkenningunum, herundir góðkenningini av Føroyum.

Kapittul 7 í GDPR snýr seg um innanhýsis samstarv millum Dátueftirlitini í ES, og er tí ikki við í lógaruppskotinum.

Sambært artikkul 97, stk. 5 kann ES-nevndin seta fram uppskot um broyting í GDPR. Hesi broytingaruppskot skulu viðgerast sambært vanligu lóggávumannagongdini í ES. Tað hevur við sær, at uppskot, sum ES-nevndin møguliga setur fram, skulu góðkennast bæði í Ráðnum fyri Evropeiska Samveldi og ES-tinginum, áðrenn tey verða endaliga samtykt. Hetta hevur við sær, at tey uppskot, sum ES-nevndin møguliga setur fram, kunnu verða nógv broytt, áðrenn endaliga úrslitið fyriliggur. Harumframt kann lóggávumannagongdin í ES vera tíðarkrevjandi, og tí kann long tíð ganga, áðrenn endaliga úrslitið av møguligum broytingaruppskotum frá ES-nevndini er klárt.

Løgmansskrivstovan metir tí, at lógaruppskotið eigur at verða viðgjørt nú. Um so er, at broytingaruppskot verða samtykt í ES, kann støða takast til, um broytingar eru viðkomandi fyri Føroyar, og um broytingar skulu gerast í føroysku lógini.

5. Vegleiðing o.a.

Føroya Arbeiðsgevarafelag, **Granskingarráðið**, **KT-felagið**, **Faroe Law**, **Starvsmannafelagið, Familjufyrisitingin**, **Kommunufelagið** og **Arbeiðs- og brunaeftirlitið** vísa á týdningin av miðvísari kunning og vegleiðing í sambandi við, at lógin verður sett í gildi. M.a. verður víst á krøvini, sum lógaruppskotið setur til fyritøkur og stovnar, og alstóra týdningin av, at avvarðandi myndugleikar skjótast til ber gera almennar og ítøkiligar vegleiðingar og leiðreglur, sum arbeiðast kann út frá, og at tað samstundis vera hildin skeið fyri starvsfólk, eitt nú førleikagevandi útbúgving til dátuverndarfólk.

BankNordik og **Faroe Law** mæla til, at góðkendar standardásetingar um flutning av persónupplýsingum til triðjalond, sbrt. § 61, fyriliggja í seinasta lagi, tá nýggja lógin fær virknað, ella at flutningsloyvi, sum Dátueftirlitið hevur givið undir galdandi lóg, vera galdandi til slíkar standardásetingar fyriliggja.

Faroe Law vísa á, at tá føroyska lógin svarar til reglur í ES, verður í størri mun møguligt at nýta vegleiðingar frá t.d. danska Datatilsynet, meðan Dátueftirlitið í størri mun kann nýta sína orku uppá serføroysk viðurskifti á dátuverndarøkinum, eftirlitsvitjanir o.a.

Gjaldstovan vísir á, at skabelónin til dátuviðgerarsáttmála, sum danska Datatilsynet hevur gjørt, er 20 síðir. Gjaldstovan mælir til, at ein føroysk skabelón verður einfaldari og í hægri mun kann verða nýtt sum stýringsamboð.

Granskingarráðið, **Ílegusavnið** og **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** vísa á týdningin av, at lógin skjótast gjørligt verður umsett til enskt.

Løgmansskrivstovan tekur undir við, at upplýsing, kunning og vegleiðing o.tíl. á dátuverndarøkinum er ógvuliga týdningarmikið.

Løgmansskrivstovan kann vísa á, at tað sambært § 68 í lógaruppskotinum er ein lógarásett uppgáva hjá Dátueftirlitinum at upplýsa um lóggávuna á økinum, t.d. skal Dátueftirlitið styrkja almenna kunnleikan til dátuvernd, umframt at styrkja kunnleikan hjá dátuábyrgdarum og dátuviðgerum um teirra skyldur sambært lógini.

Løgmansskrivstovan skal eisini viðmerkja, at tá lagt verður upp til at leggja á annan bógv í persónupplýsingarlóggávu – t.e. at fara frá eini skipan við loyvum og fráboðanum frammanundan til, at tað í hægri mun verður dátuábyrgdarin sjálvur, sum skal meta um, hvørt lógin verður fylgd – setur hetta høg krøv til Dátueftirlitið at tryggja, at tey, sum skulu fylgja lógini, hava nøktandi vitan og amboð. Hetta hevur við sær, at Dátueftirlitið í sambandi við, at lógin verður sett í gildi – t.e. bæði áðrenn og aftaná – skal kunna alment og ítøkiligt. Hetta kann vera við vegleiðingum, leiðbeiningum o.s.fr., sum skulu verða tøkar í góðari tíð, áðrenn lógin kemur í gildi.

Sum m.a. Gjaldstovan vísir á, so eru donsk skjøl tøk, av tí, at GDPR hevur verið í gildi í Danmark síðani mai 2018. Tað er umráðandi, at vegleiðingar o.a. til dátuverndarlógina eru tøkar á føroyskum og eru gjørdar til føroysk viðurskifti. Tað verður tí ein raðfest uppgáva hjá Dátueftirlitinum at tryggja, at so er.

Løgmansskrivstovan hevur nágreinað pkt. 1.4.9. í almennu viðmerkingunum og í serligu viðmerkingunum til § 61 og § 81 hesum viðvíkjandi.

Tá lógaruppskotið er samtykt, syrgir Løgmansskrivstovan fyri, at hon verður umsett til enskt.

6. Fíggjarligar avleiðingar og gildiskoma

Dátueftirlitið vísir á, at lógaruppskotið fer at hava við sær eina størri arbeiðsbyrðu fyri stovnin, og at játtanin tí eigur at verða økt. Dátueftirlitið vísir í tí sambandinum á, at eftirlitini í hinum norðurlondunum er økt í sambandi við, at GDPR kom í gildi. **Starvsmannafelagið** vísir eisini á, at Dátueftirlitið í minsta lagi hevur tørv á teimum 6 starvsfólkunum, sum eru umrødd í lógaruppskotinum.

Gjaldstovan, **KT-felagið** og **Familjufyrisitingin** meta, at tað verður kostnaðarmikið fyri einstøku stovnarnar og fyritøkurnar at uppfylla krøvini í lógini. Hetta kemst sambært Gjaldstovuni m.a. av, at flestu stovnar ikki uppfylla treytirnar í galdandi løgtingslóg. **Starvsmannafelagið** og **Fróðskaparsetur Føroya** vísa á, at umsitingarliga byrðan verður størri.

Ílegusavnið, **Familjufyrisitingin** og **Almannamálaráðið** vísa á, at tað kann verða neyðugt við serstakari fígging til dátuverndarfólkið, ið sambært serligu viðmerkingunum til § 54 skal hava serkunnleika til dátuverndarrætt. Eisini **Fróðskaparsetur Føroya** vísir á hægri útreiðslur til dátuverndarfólk, og skýtur upp, at felags dátuverndarfólk verður sett hjá KT-Landsins ella Dátueftirlitinum, sum kunnu veita ráðgeving.

KT-felagið og **Gjaldstovan** meta, at skotbráið er ov stutt, at løgtingslógin skal koma í gildi 1. januar 2021. **Familjufyrisitingin** mælir til, at uppskotið ikki verður sett í gildi fyrr enn trygt talgilt samskifti er fingið til vega millum myndugleikar og borgarar.

Kommunufelagið metir, at lógaruppskotið hevur við sær økta fíggjarliga byrðu, sum ikki kann haldast innanfyri egnar karmar. Kommunufelagið ynskir tí ein dialog um, hvussu implementeringin av øktu krøvunum skal fíggjast og hvussu kommunurnar skulu kompenserast fyri øktu útreiðslurnar.

Í pkt. 2.1. í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið er greitt frá hvussu játtanin til Dátueftirlitið verður økt. Løgmansskrivstovan metir, at henda økta játtanin er nøktandi.

Løgmansskrivstovan ásannar, at lógaruppskotið ikki er útreiðsluneutralt. Almennu viðmerkingarnar í pkt. 2.1 er tillagaðar í trá við hetta.

Til viðmerkingarnar frá Kommunufelagnum kann serliga viðmerkjast, at kommunur í útgangsstøðinum sjálvar skulu fíggja implementeringina av lógini. Hetta er tað sama, sum er galdandi fyri myndugleikar hjá landinum. Lógin er ein almenn regulering av fyrisitingini, sum myndugleikar í útgangsstøðinum ikki verða kompenseraðir fyri at halda.

Lagt kann eisini verða afturat, at tær skyldur, sum lógin ásetur, í stóran mun eru skyldur, sum longu eru í galdandi løgtingslóg, t.e. kunningarskyldan og skyldan at hava dátuviðgeraravtalur.

Hóast hetta skilir Løgmansskrivstovan stúranina hjá Kommunufelagnum, at tað er ein stór uppgáva at lyfta kommunurnar uppá støðið, sum nýggja lógin ásetur. Í tí sambandinum kann vísast á, at tað í heila tikið verður ein raðfest uppgáva hjá Dátueftirlitinum at arbeiða við, at m.a. kommunur verða klárar til nýggju lógina. Í hesum liggur m.a. kunning og vegleiðing, herundir t.d. at gera skabelónir, sum kunnu brúkast at uppfylla kunningarskylduna.

Um útreiðslur til dátuverndarfólk verður víst til viðmerkingarnar niðanfyri undir Dátuverndarfólk og yvirlit.

Í mun til gildiskomu heldur Løgmansskrivstovan fast í, at løgtingslógin skal koma í gildi 1. januar 2021. Tó eru tillagingar gjørdar í § 81, soleiðis at dátuábyrgdarar, sum hava fingið loyvi frá Dátueftirlitinum ella hav dátuviðgeraravtalur, sum eru í trá við galdandi løgtingslóg, fáa eina longri skiftistíð.

7. Váðagrundað tilgongd til dátuvernd

Gjaldstovan spyr, hvussu viðmerkingarnar til § 38 skulu skiljast, tá sagt verður, at § 38 ikki setur krav um, at skipanir, sum dátuábyrgdarin longu nýtir, skulu sniðgevast av nýggjum. Somuleiðis spyr Gjaldstovan, hvussu viðmerkingarnar til § 81 skulu skiljast hesum viðvíkjandi. Eisini **Dátueftirlitið** vísir á, at tað er óheppið, at § 38 einans er galdandi fyri nýggjar skipanir.

Betri, **KT-felagið** og **Felagið Føroyskir Grannskoðarar** vísa á, at m.a. § 28, stk. 2, § 37 og § 38, stk. 1 ikki eru orðaðar í trá við ásetingarnar í GDPR, og at tað tí ikki gongur klárt fram í uppskotinum, at kostnaðurin av at verkseta KT-loysnir er partur av váðagrundaðu tilgongdini.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar vísir á, at tað eigur at verða nevnt í 37, at tey tøkniligu og bygnaðarligu tiltøkini, sum verða sett í verk eisini fevna um hóskandi politikkir fyri dátuvernd. Eisini mælir felagið til, at artikkul 32, stk. 2 í GDPR verður tikið við í lógartekstin í § 46.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar vísir harumframt á, at tað er ógreitt hvørji krøv í trygdarkunngerðini fella burtur og hvørji framhaldandi verða galdandi. **Dátueftirlitið** mælir frá, at trygdarkunngerðin verður sett úr gildi.
Lógaruppskotið byggir á eina váðagrundaða tilgong til dátuvernd. Hetta hevur við sær, at trygdartiltøkini, sum verða sett í verk, skulu avspegla váðan, sum er við viðgerðini. Jú størri váðin er, jú hægri eru krøvini til trygdina.

Í pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið er greitt nærri frá váðagrundaðu tilgongdini. M.a. stendur, at váðagrundaða tilgongdin krevur eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Við í samlaðu metingini av, um tað er ein váði við viðgerðini, um váðin er stórur og hvørji trygdartiltøk skulu setast í verk, skal hædd m.a. takast fyri verandi tøkniliga støði, verksetanarkostnaði, slagi av viðgerð og slagi av upplýsingum. Eisini vavi, samanhangur og endamálið við viðgerðini og álvarin fyri rættindi hjá einstaklingum skal takast við í metingina.

Í arbeiðinum við lógaruppskotinum hevur Løgmansskrivstovan lagt seg eftir, at málið í sjálvum lógartekstinum ikki skuldi verða eins tungt og málið í GDPR. Lógarásetingarnar eru tískil ikki orð-fyri-orð umsetingar. Heldur er tekstur úr artiklunum í GDPR við í serligu viðmerkingunum í lógaruppskotinum. Hetta verður mett í hægri mun at vera í trá við føroyskan lóggávusið, umframt at tað ger lógartekstin lættari at lesa.

Soleiðis er við t.d. § 28, stk. 2 og § 38, stk. 1. Hesar ásetingar byggja á ávikavist artikkul 17, stk. 2 og artikkul 25, stk. 1 í GDPR. Í hesum artiklum er váðagrundaða tilgongdin lýst í sjálvum lógartekstinum, meðan tað í føroyska uppskotinum er greitt frá í serligu viðmerkingunum. Í viðmerkingunum til báðar ásetingarnar stendur, at verksetanarkostnaður er ein partur av váðagrundaðu tilgongdini, og tí nakað, sum dátuábyrgdarin kann taka við í metingina av, hvørji trygdartiltøk o.a. skulu setast í verk.

§ 37 er ein yvirskipað áseting, sum staðfestir, at dátuábyrgdarin skal hava eitt trygdarstøðið, sum svarar til váðan. Tá verksetanarkostnaður ikki er við í hesi áseting – hvørki í lógaruppskotinum ella í GDPR – er tað tí, at hetta einans er ein staðfesting av yvirskipaðu skylduni hjá dátuábyrgdaranum. Viðmerkjast skal at § 37 av somu orsøk ikki er revsiáløgd.

Løgmansskrivstovan metir ikki, at tað skal verða ásett sum krav í § 37, at dátuábyrgdarin skal syrgja fyri hóskandi dátuverndarpolitikki. Tað er tó lagt afturat í serligu viðmerkingunum til § 37, at tiltøkini, sum verða sett í verk, kunnu fevna um verksetan av hóskandi dátuverndarpolitikki.

Í viðmerkingunum til § 38, stk. 1 stendur, at "ásetingin ikki er galdandi fyri skipanir, sum longu viðgera persónupplýsingar, tá henda løgtingslóg kemur í gildi. Ásetingin hevur sostatt ikki við sær, at skipanir, sum dátuábyrgdarin longu nýtir, skulu sniðgevast av nýggjum".

Hetta skal skiljast so, at ítøkiliga skyldan, sum er í § 38, stk. 1 – dátuvernd gjøgnum sniðgeving – er galdandi fyri nýggjar skipanir. Hetta merkir ikki, at eingi krøv eru til verandi skipanir. Verandi skipanir skulu lúka krøvini í lógini, eins og tær í dag skulu lúka krøvini í galdandi lóg,

herundir meginreglurnar í § 7. Serligu viðmerkingarnar til § 81 um gildiskomu vóru ikki nóg greiðar hesum viðvíkjandi og eru tí broyttar.

§ 46 er broytt í samsvari við viðmerkingina hjá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar.

Við lógaruppskotinum verður galdandi løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum sett úr gildi. Tað sama er galdandi fyri kunngerðir, sum hava heimild í løgtingslógini, herundir trygdarkunngerðina. Hetta merkir, at krøvini í trygdarkunngerðini fella burtur.
Hetta hongur saman við váðagrundaðu tilgongdini til dátuvernd og meginregluni um ábyrgd. Tað er dátuábyrgdarin, sum skal meta um váðan og hvørji tiltøk skulu setast í verk í samband við tann ítøkiliga váðan. Víst verður tó til pkt. 1.4.3. í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, har greitt verður frá, at trygdarkunngerðin, hóast hon verður sett úr gildi, kann verða nýtt sum íblástur í mun til hvørji trygdartiltøk kunnu verða relevant.

Løgmansskrivstovan metir ikki, at landsstýrismanninum skal verða heimilað at seta eina kunngerð sum trygdarkunngerðina í gildi, har krøv verða ásett dátuábyrgdarum o.ø. Orsøkin er, at hetta ikki er í trá við endamálið við løgtingslógini, sum er, at dátuábyrgdarin sjálvur skal meta um, hvørji tiltøk eru fyri neyðini, og ikki verða bundin av hvørji krøv eru ella ikki eru í eini kunngerð. Heldur kann Dátueftirlitið í vegleiðingum o.ø. vísa á viðkomandi trygdartiltøk.

8. Vakmyndatól
Dátueftirlitið mælir til eina serliga áseting um, at viðgerð av persónupplýsingum við yvirvøkutóli í útgangsstøðinum er bannað. Dátueftirlitið vísir á, at alsamt fleiri vakmyndatól verða sett upp, hóast vakmyndatól eiga at verða nýtt við størsta varsemi, av tí at tólini eru skerjandi fyri persónliga frælsið.

Løgtingslógaruppskotið fevnir – eins og galdandi løgtingslóg – um viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram við vakmyndatóli.

Lóg nr. 278 frá 9. juni 1982 om forbud mod privates TV-overvågning m.v., sum var sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan nr. 155 frá 21. marts 1988, ásetur, at privat – við ávísum undantøkum – ikki hava loyvi at seta vakmyndatól upp á øki, sum almenningurin hevur atgongd til.

Vakmyndatól, sum privat lógliga seta upp – t.e. á privatum øki – og vakmyndatól, sum tað almenna setur upp, eru, í tann mun persónupplýsingar verða viðgjørdar, fevnd av galdandi persónsupplýsingarlóg. Hetta hevur við sær, at t.d. meginreglurnar og viðgerðarreglurnar eru galdandi fyri hesa viðgerð. Hetta verður ikki broytt við lógaruppskotinum.

Í kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi er ásett, at viðgerð av persónupplýsingum við vakmyndatóli skal fráboðast Dátueftirlitinum. Kunngerðin, og harvið kravið um fráboðan, fellur burtur við nýggju lógini.

Løgmansskrivstovan tekur undir við Dátueftirlitinum í, at lóggávan um vakmyndatól eigur at verða endurskoðað og dagført. Løgmansskrivstovan tekur tó ikki undir við, at dátuverndarlógin skal hava eina áseting, sum bannar viðgerð av persónupplýsingum við yvirvøkutólum. Hetta fellir uttanfyri økið, sum ein almenn dátuverndarlóg skal regulera. Orsøkin er m.a., at endamálið við einum vakmyndatólið í fyrstu syftu ikki er at viðgera persónupplýsingar, sjálvt um hetta er ein íbygd avleiðing. Tí kunnu tað vera fleiri sjónarmið, sum skulu takast við, tá møguleikin at

nýta vakmyndatól og onnur yvirvøkutól verður viðgjørdur, t.d. kriminalitetsfyribyrging, og ikki einans spurningurin um viðgerð og vernd av persónupplýsingum.

Løgmansskrivstovan leggur tí heldur upp til, at lógin um forbud mod privates TV-overvågning m.v. verður endurskoða og dagførd, herundir møguliga víðkað til eisini at fevna um almennar myndugleikar, og at viðkomandi partar, herundir Dátueftirlitið, verða tiknir við uppá ráð í tí sambandi.

9. Allýsingar
Fólkaheilsuráðið, **Ílegusavnið**, **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** mæla til, at hugtakið pseudonymisering (dulnevning) verður allýst í lógartekstinum.
Ílegusavnið vísir á, at hugtøkini brongling og dulnevning eru blandað saman í § 46 og í viðmerkingunum ásetingina.

Betri mælir til, at allar allýsingarnar í donsku lógini verða tiknar við í føroysku lógina, av tí at hugtøkini eisini eru viðkomandi í Føroyum.

Viðmerkingin um dulnevning er tikin til eftirtektar.

Allýsingarnar, sum eru við í lógaruppskotinum, eru tær, sum eru mettar neyðugar fyri, at lógaruppskotið hongur saman. Tað verður einans mett neyðugt at hava eina allýsing við, um hugtakið verður brúkt í lógini, og um tað kann verða ógreitt, hvat hugtakið merkir.

Harumframt eru ávísir partar av GDPR ikki við í uppskotinum, t.d. reglurnar um innanhýsis samstarv millum dátueftirlitini í ES. Allýsingar knýttar at hesum pørtum eru ikki við í lógaruppskotinum.

10. Upplýsingar um deyðar persónar
Fólkaheilsuráðið, **Ílegusavnið** og **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** mæla til, at tað í sjálvum lógartekstinum verður ásett, at løgtingslógin einans fevnir um livandi persónar. **Faroe Law** mælir hinvegin til at umhugsað gjølla, um dátuverndarlógin skal verða galdandi eisini fyri deyðar persónar, tí upplýsingar kunnu hava týdning fyri eftirmæli hjá persónum.

Gjaldstovan spyr hvørja verju upplýsingar um deyð fólk hava, um upplýsingarnar ikki eru fevndar av dátuverndarlógini.

KT-felagið vísir á, at tá løgtingslógin einans fevnir um upplýsingar um deyðar persónar, um tær kunnu knýtast at einum livandi persóni, eigur hetta at verða nágreinað í vegleiðing ella kunngerð.

Lagt upp til, at løgtingslógin einans skal fevna um upplýsingar um livandi persónar. Upplýsingar um deyðar persónar eru bert fevndar av lógini, um tær kunnu knýtast at einum livandi persóni, t.d. um upplýsingar um ein deyðan persón siga nakað um arvaligar sjúkur hjá einum núlivandi persóni.

Hetta førir víðari galdandi rætt.

GDPR letur tað verða upp til ES-limalondini um reglurnar í fyriskipanini skulu verða galdandi fyri upplýsingar um deyð fólk. Í Danmark hevur man valt, at GDPR skal verða galdandi í 10 ár aftaná, at ein persónur er deyður.

Løgmansskrivstovan hevur valt, at dátuverndarlógin einans skal verða galdandi fyri livandi persónar. Hetta merkir ikki, at deyð fólk onga vernd hava. T.d. eru vanligu fyrisitingarreglurnar, reglur um tagnarskyldu, revsilógin og lóggávan á heilsuøkinum framhaldandi galdandi fyri upplýsingar um deyðar persónar.

Løgmansskrivstovan metir ikki, at tað skal ásetast í sjálvum lógartekstinum, at lógin einans er galdandi fyri upplýsingar um livandi persónar. Hetta m.a. tí, at upplýsingar um deyðar persónar kunnu vera fevndar, sbr. omanfyri, og at ein slík áseting tískil kann verða misvísandi.

Tað kunnu vera føri, tá tað er ilt at meta um, hvørt ein upplýsing er fevnd av lógini ella ikki. Hetta eigur at verða nágreinað í siðvenju og møguliga í vegleiðing frá Dátueftirlitinum.

11. Viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum
BankNordik og **Betri** vísa á týdningin av, at tað gerst greiðari, at viðkvæmar persónupplýsingar kunnu viðgerast, um hetta er krav sambært lóggávu. Eisini **Almannaverkið** og **Kommunufelagið** vísa á týdningin av, at myndugleikarnir hava greiða heimild at viðgera viðkvæmar persónupplýsingar í sambandi við myndugleikaútinnan.

Dátueftirlitið mælir til, at bæði § 8 og § 12 vísa á lógarheimild sum viðgerðargrundarlag.

BankNordik og **Betri** vísa á, at tað er neyðugt at áseta greitt, at privat kunnu viðgera upplýsingar um revsiverd viðurskifti, um hetta er heimilað í lóg ella krav sambært lóg.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar mælir til, at uppreksanin av viðkvomum upplýsingum í § 11 einans fevnir um somu upplýsingar sum GDPR, t.e. at revsiverd viðurskifti, munandi sosialir trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti vera strikað úr § 11. **Felagið Føroyskir Grannskoðarar** og **KT-Felagið** mæla til, at yrkisfelagsligt tilknýti verður strikað úr § 11.

Heilsumálaráðið mælir til, at politisk støða verður tikin til tilmælini um dátuvernd í áliti um útgreinan av lóggávuni á humangenomøkinum í Føroyum frá 2015.

Í trá við viðmerkingarnar hjá Dátueftirlitinum, Kommunufelagnum, Almannaverkinum, BankNordik og Betri er tað ásett í § 12, at viðgerð kann fara fram, um hetta er heimilað í lóg. Eisini er ásett í § 13 um revsiverd viðurskifti, at viðgerð kann fara fram, um heimild er fyri hesum í § 12, t.e. m.a. heimild í lóg. Viðmerkjast skal, at hetta ikki er lagt afturat í § 8 um vanligar upplýsingar, tí innihaldið er fevnt av t.d. § 8, stk. 1, nr. 3.

Bólkingin av viðkvomum persónupplýsingum í § 11 fevnir um allar tær upplýsingar, sum í dag eru bólkaðar sum viðkvæmar. Í serligu viðmerkingunum til § 11 er greitt frá orsøkini til, at upplýsingar um revsiverd viðurskifti, munandi sosialir trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti, sum ikki eru at rokna sum viðkvæmar persónupplýsingar í ES, framhaldandi verða bólkaðar, sum viðkvæmar upplýsingar í Føroyum.

Meðan tað ikki er nakar trupulleiki í mun til t.d. triðjalandsgóðkenning at hækka verndarstøðið fyri tann einstaka – t.e. at geva fleiri sløgum av persónupplýsingum eina betri vernd – so kann tað gerast ein trupulleiki, at verndarstøðið verður lækkað – t.e. at upplýsingar, sum áður hava verið bólkaðar sum viðkvæmar, verða bólkaðar sum vanligar. M.a. tí hevur Løgmansskrivstovan valt, at t.d. upplýsingar um yrkisfelagsligt tilknýti, sum í almennu føroysku tilvitskuni ikki altíð verður mettar sum viðkvæmar, framhaldandi verður bólkaðar sum viðkvæmar upplýsingar.

Tað skal í tí sambandinum viðmerkjast, at allar viðgerðarheimildirnar í § 12 kunnu nýtast sum grundarlag fyri viðgerð av upplýsingum um yrkisfelagsligt tilknýti, herundir samtykki (nr. 1) og um viðgerðin er neyðug fyri at halda starvsrættarligar skyldur og tilskilað rættindi hjá dátuábyrgdaranum ella skrásetta (nr. 3).

Um støðutakan til tilmælini í Humangenomálitinum kann viðmerkjast, at humangenomøkið er eitt serøkið, sum tað er skilabest at regulera í serstakari lóg og ikki í eini almennari dátuverndarlóg. Viðmerkjast skal tó, at tað í lógaruppskotinum er lagt upp til, at ílegudátur eru at rokna sum viðkvæmar upplýsingar.

12. Persónstalið

Gjaldstovan og **KT-felagið** mæla til, at § 16 um viðgerð av p-talinum verður strikað, og at henda viðgerð verður fevnd av § 8. Gjaldstovan vísir á, at p-talið er eitt gott amboð til eintýðuga eyðmerking av borgarum í Føroyum, men hinvegin ikki eigur at verða nýtt sum samleikaprógv. Víst verður eisini á, at ein av fyritreytunum fyri at effektivisera føroyska samfelagið og geva borgarum tíðarhóskandi og lættatkomuligar talgildar tænastur er, at hava eina eintýðuga eyðmerking av borgarum.

Gjaldstovan mælir til, at tað í minsta lagi verður møguligt hjá fyritøkum, sum fremja týðandi samfelagsligar tænastur, t.d. peningastovnar, tryggingarfeløg, pensiónsfeløg, Posta o.s.fr., at móttaka p-talið.

Faroe Law mælir til, at § 16, stk. 3 í uppskotinum, sum snýr seg um møguleikan hjá privatum at víðarigeva persónstalið, verður strikað.

Løgmansskrivstovan metir, at galdandi áseting á rættan hátt tekur fyrilit fyri verju av p-talinum hjá tí einstaka, samstundis sum møguleiki er fyri, at p-talið kann viðgerast, t.d. í sambandi við øktu talgildingina.

Í trá við viðmerkingarnar hevur Løgmansskrivstovan tó tillaga serligu viðmerkingarnar til ásetingina, soleiðis at galdandi siðvenja fyri viðgerð av p-talinum kann verða broytt og gerast meira í trá við talgilda veruleikan.

13. Viðgerð av persónupplýsngum til vísindalig o.o. endamál

Fólkaheilsuráðið, **Ílegusavnið**, **Fróðskaparsetur Føroya** og **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** vísa á, at samtykki ofta verður nýtt í vísindaligum granskingarverkætlanum, og at hetta eigur at vera við í viðmerkingunum til § 12, stk. 1. Eisini verður víst á, at tað er umráðandi, at Dátueftirlitið í sínum arbeiðið við at leggja fast praksis um nýtslu av viðgerðarheimildunum, hevur í huga, at Vísindasiðsemisnevndin altíð góðkennir orðingar í samtykkum, sum verða givin í granskingarverkætlanum. **Fróðskaparsetur Føroya** vísir eisini á, at viðmerkingarnar til § 12, stk. 2 eiga at verða nágreinaðar.

Fólkaheilsuráðið, **Ílegusavnið** og **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** vísa á, at artikkul 9, stk. 2, litra i og j í GDPR ikki eru at finna í uppskotinum, og at hesar ásetingar eru týdningarmiklar fyri heilsuøkið.

Heilsumálaráðið, **Fólkaheilsuráðið**, **Granskingarráðið**, **Ílegusavnið** og **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** mæla til, at tað verður nágreinað í viðmerkingunum til § 18, at henda áseting

snýr seg um sokallaða registaragransking. **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** greiðir í sínum ummælisskrivi frá týdninginum av slíkari gransking.

Granskingarráðið ynskir meira vegleiðing í viðmerkingunum um, hvussu *munandi samfelagsligan týdning* í § 18, stk. 1 skal skiljast. **Heilsumálaráðið**, **Fólkaheilsuráðið**, **Ílegusavnið**, **Fróðskaparsetur Føroya** og **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** vísa á, at tað í viðmerkingunum til § 18, stk. 2 eigur at verða nágreinað hvussu *annað endamál* skal skiljast, og at tað í viðmerkingunum til § 18, stk. 3 eigur at verða nágreinað, hvat skilst við víðarigeving til triðjapersón, sum Dátueftirlitið skal geva loyvi til.

Løgmansskrivstovan hevur tillaga serligu viðmerkingarnar til § 12 og § 18 í trá við viðmerkingarnar omanfyri.

Artikkul 9, stk. 2, litra i og litra j eru ásetingar, sum heimila ES-limalondunum at áseta serligar reglur í nationalari lóggávu.

Stk. 2, litra i, sum snýr seg um samfelagsáhugamál á fólkaheilsuøkinum, er áseting, sum skal nágreinast í serlóggávu, og ikki í einari almennari dátuverndarlóg. Tað merkir, at hóast stk. 2, litra i ikki er at finna í lógaruppskotinum, hevur hetta ikki við sær, at viðgerð til hesi endamál er útilokað. Tann viðgerð til hesi endamál, sum fer fram í dag sambært aðrari lóggávu, kann eisini fara fram, tá hendan lógin kemur í gildi.

Stk. 2, litra j, sum snýr seg um viðgerð til arkivendamál og til vísindalig endamál o.a. er við í § 18 og § 20 í lógaruppskotinum.

14. Striking
Gjaldstovan og **KT-felagið** vísa á, at tað kann verða ómøguligt at lúka kravið um striking í back-up-skipanum, og at kravið í § 28 tí eigur at tillagast.

Serligu viðmerkingarnar til § 28 eru tillagaðar. Tað er sostatt gjørt greitt, at skyldan at strika persónupplýsingar í back-up-skipanum einans er galdandi, tá hetta er tøkniliga møguligt.

13. Viðgerðarloyvi
Dátueftirlitið tekur ikki undir við, at Dátueftirlitið ikki longur skal geva loyvi til ávísar viðgerðir. Dátueftirlitið skjýtur upp eina áseting um, at Dátueftirlitið skal geva viðgerðarloyvið til viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum umframt øðrum viðgerðum, um viðgerðin skilliga ger seg inn á týðandi persónverndaráhugamál. Dátueftirlitið vísir á, at royndirnar hjá stovninum vísa, at dátuábyrgdarar sjálvdan hava skil á trygdini o.ø. fyrstu ferð, teir eru í samband við Dátueftirlitið.

Starvsmannafelagið ivast í, um tað er skilagott og ráðiligt at seta eina skipan í verk, sum ikki longur setur krav um viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Starvsmannafelagið eftirlýsir haldgóðar og dokumenteraðar grundir frá praksis hjá Dátueftirlitinum at broyta verandi skipan, og eftirlýsir samstundis skjalprógv fyri at nýggja skipanin fer at gagna dátuverndini.

Lógaruppskotið er grundað á ES-fyriskipanina GDPR, sum byggir á eina skipan, sum í hægri mun enn í dag byggir á ábyrgd. Tað merkir í høvuðsheitum, at tann, sum er fevndir av lógini, hevur ábyrgdina av at tryggja, at lógin verður fylgd, og t.d. ikki skal hava viðgerðarloyvi frammanundan viðgerð.

Orsøkin til, at henda skipan er vald í ES er ein meting av, at áður galdandi skipan við loyvum og fráboðanum var umsitingarlig tung og hevði við sær byrður fyri dátuábyrgdarar, dátueftirlit o.o., sum ikki svaraðu til ágóðan.

Løgmansskrivstovan hevur ikki gjørt kanningar, sum svara til tær, sum ES-nevndin gjørdi, áðrenn hon setti fram uppskot um eina nýggja dátuverndarfyriskipan.

Løgmansskrivstovan er tó av teirri fatan, at tað er skynsamt at hava somu lóggávu í Føroyum, sum er í restini av Evropa. Harafturat tekur Løgmansskrivstovan undir við, at ein dátuverndarlóg skal leggja dent á at fremja dátuvernd í verki heldur enn á umsiting og formlig krøv. Tað ger lógaruppskotið (og GDPR) í hægri mun enn galdandi lóg.

At viðgerðarloyvi verða strikað úr lógini merkir ikki, at dátuábyrgdarar o.o. verða slept upp á fjall, tá tað kemur til at lúka krøvini í lógini. Tann vegleiðandi og kunnandi uppgávan hjá Dátueftirlitinum er ein umráðandi partur av tí nýggju skipanini og ein fortreyt fyri, at skipanin kann virkað væl. Tað er sostatt umráðandi, at Dátueftirlitið kemur breitt út og ikki bara til dátuábyrgdarar, sum søkja um loyvi.

Hinvegin er eisini umráðandi at viðmerkja, at tað, at kravið um viðgerðarloyvi verður strikað, ikki hevur við sær, at heimildirnar hjá Dátueftirlitinum verða skerdar. Dátueftirlitið kann sostatt framhaldandi m.a. steðga viðgerð ella geva kravboð um, at viðgerð fæst í rættlag.

Løgmansskrivstovan heldur tí fast í, at kravið um viðgerðarloyvi eigur at verða strikað.

15. Flutningur til útlond

Sambært **Dátueftirlitinum** hava dátuábyrgdarar sjálvdan skil í tingunum fyrstu ferð, teir eru í samband við Dátueftirlitið, tá persónupplýsingar skulu flytast úr Føroyum. Dátueftirlitið mælir tí til, at reglurnar um flutning – sum leggja upp til, at kravið um fráboðan til og loyvi frá Dátueftirlitinum verður strikað – verða endurskoðaðar. Eisini vísir Dátueftirlitið á, at ein dátuábyrgdari, sum letur persónupplýsingar víðari til dátuábyrgdara í einum øðrum landi ikki skal verða fevndur av kapittul 6, men einans av §§ 12-14.

Kapittul 6 er galdandi í øllum førum, tá persónupplýsingar verða fluttar úr Føroyum. Umframt heimild til flutningin í kapittul 6, skal dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin lúka treytirnar í løgtingslógini annars, herundir reglurnar í kapittul 2.

Reglurnar í kapittul 6 um flutning av persónupplýsingum til útlond, triðjalond og millumtjóðafelagsskapir hava við sær, at flutningur til ES-lond og EBS-lond – har GDPR er galdandi rættur – kann fara fram uttan loyvi ella góðkenning frammanundan. Hetta hevur við sær, at rættarstøðan í Føroyum verður tann sama sum í ES-londum og EBS-londum. Í hesum londum krevst sostatt ikki loyvi ella góðkenning frammanundan at flyta persónupplýsingar til Føroyar.

Flutningur til triðjalond og millumtjóðafelagsskapir kann fara fram, um heimild er fyri hesum í §§ 60-63, t.d. um landsstýrismaðurin í kunngerð hevur ásett, at eitt land tryggjar eitt nøktandi verndarstøði.

Løgmansskrivstovan metir, at ásetingarnar í kapittul 6 geva skrásetta eina nøktandi trygd, samstundis sum hædd verður tikin fyri, at føroyskar fyritøkur o.o. hava nógv samskifti við útheimin.

16. Dátuverndarfólk og yvirlit

Starvsmannafelagið vísir á, at tað ikki er nágreinað, hvussu orðið *samtak* í § 53, stk. 2 skal skiljast. Starvsmannafelagið mælir til at broyta hetta til t.d. *samstarv*.

KT-felagið metir tað verða óheppið, at lagt verður upp til, at dátuverndarfólkið skal verða løgfrøðingur. Heldur skal dentur leggjast á, at viðkomandi hevur førleikarnar at røkja starvið.
Familjufyrisitingin vísir á, at ikki allir stovnar hava fólk við neyðugu førleikunum at verða dátuverndarfólk.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, at tað er ógreitt, nær privatar fyritøkur skulu tilnevna dátuverndarfólk. Samstundis vísir **Føroya Arbeiðsgevarafelag** á, at tað eigur at verða nágreinað, nær kravið um yvirlit er galdandi fyri fyritøkur.

Gjaldstovan mælir til at nágreina, hvat "sløg av persónupplýsingum" í § 44, nr. 3 um yvirlit merkir. **Felagið Føroyskir Grannskoðarar** metir, at tað ikki gevur meining at vísa til viðgerð, sum bara er við hvørt í § 45, nr. 2, av tí at allýsingin av viðgerð er so breið, at viðgerð ongantíð bara er við hvørt.

Krøvini um dátuverndarfólk og yvirlit eru krøv, sum koma í staðin fyri krav um viðgerðarloyvi og fráboðan frammanundan viðgerð. Tað eru sostatt krøv, sum skulu vera við til at tryggja, at dátuverndin hjá tí einstaka dátuábyrgdaranum og dátuviðgerðanum er á einum nóg høgum støði. Tað verður mett skynsamt og neyðugt, at førleikar innan dátuvernd eru til staðar hjá tí einstaka dátuábyrgdaranum og dátuviðgeranum til tess at hækka um dátuverndina sum heild.

Sambært § 54, stk. 1 skal dátuverndarfólkið tilnevnast grundað á fakligan førleika, serliga serkunnleika til dátuverndarrætt og dátuverndarsiðvenju umframt førleika at útinna tær uppgávur, sum eru ásettar í § 58.

Í serligu viðmerkingunum til § 54 stendur m.a., at fyri at lúka treytirnar verður í útgangsstøðinum lagt upp til, at persónurin hevur løgfrøðiligar førleikar innan fyri dátuverndarrætt og hevur royndir á hesum økinum. Á hvørjum støði hesir førleikar ella royndir skulu vera, velst um viðgerðina av persónupplýsingar, herundir mongd, viðkvæmi og torgreidni. Tað verður við hesum ikki sett sum krav, at dátuverndarfólkið er løgfrøðingur (cand.jur). Hetta er upp til dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran at meta um. Tað kann t.d. eisini vera skilagott, um dátuverndarfólkið hevur eina tøkniliga útbúgving ella ávísar tøkniligar førleikar.

Um ein dátuábyrgdari ikki hevur starvsfólk, sum hava neyðugu førleikarnar, kunnu uppgávurnar sambært § 54, stk. 2 útinnast sambært tænastuveitingarsáttmála, t.e. við einum eksternum konsulenti. Viðmerkjast skal tó eisini, at tað í tíðini til løgtingslógin kemur í gildi verður møguligt at tryggja, at egið starvsfólk fær neyðugu førleikarnar, t.d. við luttøku á skeiðum o.s.fr.

Tað verður ikki við lógaruppskotinum sett sum krav, at dátuverndarfólkið skal hava eina ávísa útbúgving sum dátuverndarfólk ella skal góðkennast (certificerast) sum dátuverndarfólk.

Sambært § 53, stk. 2 kann eitt samtak velja felags dátuverndarfólk. Í trá við viðmerkingina hjá Starvsmannafelagnum eru serligu viðmerkingarnar tillagaðar, soleiðis at tað er greitt, at tað eisini er møguligt hjá samtøkum at hava felags dátuverndarfólk.

Viðmerkingin hjá Gjaldstovuni til § 44, nr. 3 er tikin til eftirtektar. Til viðmerkingina hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag um, nær krøvini um dátuverndarfólk og yvirlit eru galdandi fyri fyritøkur, er at viðmerkja, at treytirnar eru nágreinaðar í serligu viðmerkingunum til § 45 og § 53.

Løgmansskrivstovan ásannar tó eisini, at tað hóast serligu viðmerkingarnar kunnu verða støður, tá tað í praksis er ivasamt, um krøvini er galdandi ella ikki. Løgmansskrivstovan metir tað tó vera skynsamast, at krøvini um dátuverndarfólk og yvirlit meira ítøkiliga verða nágreinaði í vegleiðingum og leiðbeiningum frá Dátueftirlitinum, sum taka útgangsstøðið í almennu treytunum, sum eru ásettar og lýstar í lógini, heldur enn at viðmerkingarnar verða nágreinaðar enn meira.

17. Dátueftirlitið

Dátueftirlitið vísir á týdningin av, at eftirlitið er óheft. Dátueftirlitið vísir á, at tað ávirkar óheftni, at tað er landsstýrismaðurin, sum hevur ábyrgdina av játtanini. Dátueftirlitið mælir til, at viðmerkingarnar um fysisku karmarnar í lógaruppskotinum, herundir at stovnurin kann húsast saman við øðrum stovnum, verða strikaðar. Dátueftirlitið vísir eisini á týdningin av einum óheftum eftirlitið fyri endurgóðkenningina frá ES, sum trygt triðjaland.

Fólkaheilsuráðið, **Granskingarráðið**, **Ílegusavnið** og **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** eru av teirri fatan, at tað er skilagott, um ein limur í Dáturáðnum hevur skil fyri strategiska týdninginum av gransking og nýtslu av dátu til vísindalig endamál.

Gjaldstovan metir tað verða óskynsamt, at formaðurin í Dáturáðnum skal verða løgfrøðingur, og mælir til, at tað í øllum førum verður krav, at ráðið er mannað við fólki, sum hava bæði løgfrøðiligar førleikar og KT-førleikar.

Dátueftirlitið og **Kommunufelagið** mæla til, at talið av limum í Dáturáðnum verður hækkað. **Dátueftirlitið** mælir samstundis frá, at allir limirnir verða skiftir samstundis.

Dátueftirlitið tekur undir við, at arbeiðið hjá stovninum verður meira gjøgnumskygt, herundir heimildini at almannakunngera avgerðir o.a. Eftirlitið tekur eisini undir við, at ráðið hevur ein meira aktivan leiklut, men vísir á, at samsýningin til limirnar í Dáturáðnum er 3000 kr. um mánan til formannin og 2000 kr. til hinar limirnar, og at arbeiðsbyrðan tí ikki kann vera ov stór.

KT-felagið tekur undir við, at Dátueftirlitið almannakunnger ársfrágreiðingar, men metir, at tað skal ásetast í hvønn mun fyritøkur og stovnar o.o. kunnu verða navngivnin í sambandi við t.d. átalur. **Felagið Føroyskir Grannskoðarar** metir, at tørvur er á nágreiniligari reglum um ársfrágreiðingina.

Dátueftirlitið mælir til broytingar í § 71 um eftirlit í verki. Eftirlitið vísir á, at Dáturáðið ikki í praksis tekur lut í eftirlitið. Samstundis verður víst á, at tað einans er eitt leiðandi starvsfólk á Dátueftirlitinum, og at tað tí er óheppið, at tað er ásett, at leiðandi starvsfólk skulu vera við, tá eftirlit fer fram. Víst er eisini á, at tað kann hugsast, at Dátueftirlitið setir serkøn fólk uttanifrá at fremja eftirlit á staðnum vegna Dátueftirlitið.

Dátueftirlitið er ein fyrisitingarligur stovnur, sum er samansettur av einum Dáturáðið og eini avgreiðsluskrivstovu.

Løgmansskrivstovan tekur undir við, at tað er týdningarmikið, at Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur stovnur. Løgmansskrivstovan metir, at tann leistur, sum lagt er upp til, og sum er tann sami, sum er í galdandi løgtingslóg, tryggjar, at Dátueftirlitið hevur tað neyðuga funktionella óheftni, herundir tað óheftni, sum krevst fyri, at ES-nevndin kann endurgóðkenna Føroyar sum trygt triðjaland.

Óheftni hevur við sær, at landsstýrismaðurin ikki kann geva tænastuboð ella á annan hátt kann leggja seg út í umsitingina av lógini, og at avgerðir tiknar av Dátueftirlitinum ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Løgmansskrivstovan tekur undir við, at Dáturáðið, sum er ein umráðandi partur av Dátueftirlitinum, skal verða sett saman av fólki, sum hava neyðugu førleikarnar. Eisini er umráðandi, at tað er ein breið umboðan í ráðnum. Av hesi orsøk er § 67 um Dáturáðið broytt, soleiðis at Dáturáðið framyvir verður samansett av fimm persónum.

Lagt verður upp til, at formaðurin framhaldandi skal vera løgfrøðingur. Harnæst skal ein limur hava nøktandi KT-førleikar og ein skal hava kunnleika til gransking. Hetta er nágreinað í serligu viðmerkingunum.

Afturat hesum er lagt upp til, at landsstýrismaðurin tilnevnir tveir limir eftir tilmæli frá ávikavist Kommunufelagnum og Vinnuhúsinum. Ásett er ikki neyvt, hvørja útbúgving o.tíl. hesir persónar skulu hava, men tað verður mett týdningarmikið, at hesir persónar, sum skulu umboða ávikavist kommunurnar og vinnuna hava neyðuga innlitið í tað økið, sum teir umboða, umframt at hava eitt ávíst innlit í dátuverndarøkið.

Sum nevnt omanfyri verður kunning og vegleiðing o.a. ein enn meira umráðandi partur av virkseminum hjá Dátueftirlitinum. Tað er umráðandi fyri tann, sum skal fylgja lógini, at vita, hvørja siðvenju Dátueftirlitið hevur. Tá hetta verður kent, er lættari at innrætta seg. M.a. tí er lógarásett., at Dátueftirlitið skal almannakunngera eina ársfrágreiðing. Hetta førir víðari galdandi rætt. Samstundis er í § 73 í lógaruppskotinum lagt upp til, at Dátueftirlitið almannakunnger úttalilsir og avgerðir.

Tað er við hesum ikki lagt upp til, at Dátueftirlitið almannakunnger navnið á fyritøkum o.s.fr. Tað er sostatt ikki talan um eina "naming-and-shaming" skipan, har navnið á fyritøkum og stovnum, sum ikki lúka reglurnar, verða førd á ein lista o.tíl. Endamálið er tvørturímóti, at tað verður lættari at læra av feilum, sum onnur hava gjørt, av tí at man sær, hvussu Dátueftirlitið ígjøgnum ítøkiligar avgerðir o.a. tulkar lógina. Orðingin av § 73 er nágreinað hesum viðvíkjandi.

Í mun til § 71 skal Løgmansskrivstovan viðmerkja, at atgongd til høli o.a. uttan rættarúrskurð er eitt sera álvarsamt inntriv fyri tann einstaka. Av hesi orsøk er tað umráðandi, at tað er leiðandi starvsfólk ella limir í Dáturáðnum, sum luttaka, og sum tryggja, at alt fer fram á rættan hátt, og at dátuábyrgdarin verður væl kunnaður, meðan eftirlitið fer fram. Um Dátueftirlitið metir, at tað er neyðugt at hava serkøn fólk við, so kunnu hesi luttaka, men Løgmansskrivstovan metir ikki, at hesi skulu hava atgongd til høli o.a. einsamøll.

18. Kæra, fyrisitingarlig sektaruppskot og revsing
Starvsmannafelagið vísir á týdningin av, at sektir ikki eru óproportionalar, so at stovnar og fyritøkur ikki hóra undan fíggjarliga, um brot vera framd. **Starvsmannafelagið** mælir samstundis til, at skipan við fyrisitingarligum sektaruppskotum verður nýtt við varsemi. **Kommunufelagið** mælir frá, at ein fyrisitingarligur myndugleiki fær møguleika at geva fyrisitingarlig sektaruppskot.

Føroya Arbeiðsgevarafelag ivast í, um tað er skilagott at hækka sektirnar, sum lagt verður upp til, samstundis sum ein almennur stovnur fær heimild at geva sektaruppskot.

Dátueftirlitið metir ikki, at ein skipan fyri fyrisitingarligum sektaruppskotum hevur sama fyribyrgjandi virkna, sum fyrisitingarligar sektir í øðrum ES-londum, at skipanin er umsitingarliga tung, og at orkan er betri nýtt til fyribyrging. Dátueftirlitið heldur tað ikki vera í samsvari við føroysk viðurskifti at sekta uttan ítøkiliga vegleiðing frammanundan.

Dátueftirlitið, **Føroya Arbeiðsgevarafelag**, **Felagið Føroyskir Grannskoðarar** og **KT-felagið** mæla til, at tað skal verða møguligt at revsa almennar myndugleikar við sekt fyri brot á lógina. **Kommunufelagið** tekur harafturímóti undir við uppskotinum, sum hevur verið til ummælis, og at almennir myndugleikar ikki skulu kunna revsast við sekt. Kommunufelagið vísir m.a. á, at royndirnar frá donskum kommunum vísa, at møguleikin fyri sekt hevur viðført eina mentan í kommunala geiranum, har óproportionalt tilvit er um ikki at gera mistøk, heldur enn at byggja upp eina mentan har dátuvernd er í miðdeplinum.

Faroe Law mælir til, at tað í viðmerkingunum verður nágreinað, at um revsing verður áløgd almennum myndugleikum, so skulu serlig atlit takast til myndugleikar og stovnar, sum veita alneyðugar vælferðartænastur, so sum sjúkuviðgerð og eldrarøkt.

Starvsmannafelagið mælir til, at møguleikin at klaga ikki skal verða tengdur at persóninum, hvørs upplýsingar t.d. eru viðgjørdar ólógliga.

Sektir, sum skulu kunna gevast fyri brot á dátuverndarlógina, eru revsirættarligar sektir. Hetta hevur við sær, at dómstólar í metingini av, hvussu stór sektin skal vera, ítøkiliga skulu meta um brotið og hvør revsing er hóskandi.

Tað hevur týdning fyri dátuverndarøkið, at sektarstøðið fyri at bróta lógina ikki er ov lágt. Tað er tó ikki ætlanin at hækka sektarstøðið so nógv, at sektirnar ikki standa mát við brotið ella tað fyritøkuna o.a., sum hevur framt brotið. Tí er í serligu viðmerkingunum til § 78 nágreinað, at dómstólarnir skulu taka hædd fyri støddini á fyritøkuni og fyrimunirnir, sum eru fingnir av at bróta lógina, tá sekt verður ásett.

Tað er ikki møguligt innanfyri grundlógarinnar karmar, at Dátueftirlitið – ella aðrir fyrisitingarligir myndugleikar – gevur fyrisitingarligar sektir. Tí er skipanin við fyrisitingarligum sektaruppskotum vald. Hetta fer at geva Dátueftirlitinum møguleika fyri, tá dómstólarir hava lagt sektarstøði fyri ávíst brot fast, undir ávísum treytum at avgreiða mál við fyrisitingarligum sektaruppskotum.

Tað er ikki lagt upp til, at Dátueftirlitið – í teimum førum tá treytirnar fyri fyrisitingarligum sektaruppskoti eru loknar – skal geva fyrisitingarlig sektaruppskot sum tað fyrsta. Eins og í dag

hevur Dátueftirlitið fleiri heimildir sambært lógini, har møguleikin fyri fyrisitingarligum sektaruppskoti er ein.

Tað er til Dátueftirlitið at meta um í hvørjum einstøkum føri, hvør heimild skal nýtast, t.d. um viðgerðin skal steðga ella kravboð skal gevast um, at viðgerð skal fáast í rætt lag. Dátueftirlitið kann t.d. eisini geva eina ávaring, um tað verður mett hóskandi. Dátueftirlitið skal sum allir aðrir myndugleikar virka í trá við vanliga fyrisitingarrættin, har lutfalsmeginreglan (proportionalitetsprincippið) er galdandi. Heimild, sum Dátueftirlitið nýtir, skal tí vera tann minst inntrívandi, sum røkkur málinum.

Tað er ikki vanligt, at fyrisitingarligir myndugleikar hava møguleika at geva fyrisitingarlig sektaruppskot. Løgmansskrivstovan metir tó, at hetta er ein týdningarmikil partur av nýggju skipanini, sum er við til at styrkja um virksemið hjá Dátueftirlitinum.

Løgmansskrivstovan heldur fast í útgangsstøðinum um, at almennir myndugleikar ikki skulu kunnu sektast fyri brot á lógina. Í eini skipan, sum tí føroysku, verður tað ikki mett skynsamt at sekta almennar myndugleikar. Serliga spurningurin um, hvaðani pengar at gjalda møguligar sektir skal koma, t.d. um sektir skulu gjaldast av teimum pengum, sum annars eru til tær kjarnuuppgávur, sum ein almennur myndugleiki sambært lóg skal útinna.

Mett verður, at tað – umframt tær heimildir Dátueftirlitið hevur t.d. at steðga viðgerð ella geva kravboð – eru nøktandi amboð innan fyri almenna geiran, sum eru við til at tryggja, at løgtingslógin verður hildin, t.d. møguleikin at geva undirliggjandi stovnum tænastuboð.

19. Ymiskar ítøkiligar viðmerkingar
Dátueftirlitið mælir til, at § 8, stk. 1, nr. 4 í galdandi lóg verður tikin við í lógaruppskotið. Dátueftirlitið mælir harumframt til, at tað verður víst til fysisk trygdartiltøk umframt tøknilig og bygnaðarlig trygdartiltøk í § 7, stk. 1, nr. 6.

Sambært § 7, stk. 1, nr. 2 í uppskotinum kunnu persónupplýsingar bert viðgerðast til nágreiniliga tilskilað og heimilað endamál og skulu ikki seinni viðgerast á ein hátt, sum er í ósamsvari við hesi endamál. Ásetingin, sum er broytt nakað í mun til § 8, stk. 1, nr. 2 í galdandi løgtingslóg, inniheldur tað týdningarmiklu regluna um endamálsavmarking, sum er grundleggjandi í dátuverndarlóggávu.

Útgangsstøðið er, at um endamálini eru í ósamsvari við upprunaligu endamálini, kann seinna viðgerðin ikki fara fram. Ásetingin í § 8, stk. 1, nr. 4, sum Dátueftirlitið vísir á, er partur av serligu viðmerkingunum til ásetingina í § 7, stk. 1, nr. 2.

§ 7, stk. 1, nr. 6 er nágreinað, so tað gongur klárt fram, at fysisk trygdartiltøk eisini eru fevnd.

Faroe Law vísa á, at tað manglar ein samskipan av føroyskari lóggávu um, nær børn sjálvi kunnu innganga avtalur o.a. og seta eisini spurnartekin við, um 13 ár er tann rætti aldurin at áseta í § 10.

Fróðskaparsetur Føroya vísir á, at lógaruppskotið átti at havt almennar ásetingar um, nær eitt barn kann geva samtykki, og ikki bert reglur um samtykki í sambandi við kunningarsamfelagstænastur, sbr. § 10.

Løgmansskrivstovan heldur fast við, at aldursmarkið í § 10 skal verða 13 ár av teimum orsøkum, sum eru nevnd í serligu viðmerkingunum til ásetingina. Ein samskipan av føroyskari lóggávu sum heild fellir uttanfyri hetta lógaruppskotið.

Spurningurin nær eitt barn kann geva samtykki til viðgerð av persónupplýsingum annars eigur at verða mett ítøkiligt. Í hesi meting eigur dátuábyrgdarin at meta um, barnið er nóg búgvið at taka støðu til viðgerðina. Aldur á barninum og hvørja viðgerð talan er um, skulu takast við í hesa meting. Vanliga er eitt barn, sum er 15 ár nóg búgvið at samtykkja til viðgerð av persónupplýsingum.

Ílegusavnið og **Heilsumálaráðið** vísa á, at tað í § 20 eigur at verða víst til ílegulógina og autorisatiónslógini umframt lóg um skjalasøvn.

§ 20 er ein almenn áseting, sum tryggjar, at tað er greitt, at persónupplýsingar fevndir av løgtingslógini kunnu flytast til goymslu í skjalasavni sambært løgtingslógini um skjalasøvn. Tað er sostatt løgtingslógin um skjalasavn, sum ásetir treytirnar fyri, hvørjar upplýsingar skulu varðveitast.

At talan er um eina almenna áseting hevur við sær, at ásetingar í serlóggávu ikki vera ávirkaðar. Um tað í serlóggávu eru ásettar reglur um, hvussu persónupplýsingar skulu goymast – t.d. í ílegulógini og autorisatiónslógini – ganga hesar reglur framum almennu ásetingina í § 20.

§ 20 fangar sostatt tær upplýsingar, sum verða viðgjørdar eftir hesi løgtingslóg, og sum ikki eru fevndar av aðrari lóggávu, sum tekur støðu til spurningin um goymslu av upplýsingum.

Hetta er lagt afturat í serligu viðmerkingunum til § 20.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar vísir á, at tað í støðum verða ásettar treytir, men at tað ikki framgongur greitt um ein ella allar treytirnar skulu verða loknar. Víst verður til § 35, stk. 2 sum dømi.

Tá treytir eru reksaðar upp í ásetingum, er tað avgerandi fyri um allar skulu vera loknar ella bert ein av teimum, um uppreksanin endar við "og" ella "ella". "Ella", sum í § 35, stk. 2 merkir, at bert ein av treytunum skal verða lokin.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar vísir á, at tað er ógreitt, hvussu ein dátuviðgeri skal veita fullgóða trygd, sum víst verður til í § 41.

Løgmansskrivstovan hevur í trá við viðmerkingina tillaga serligu viðmerkingarnar til § 41. Greitt verður m.a. frá, hvørjar skyldur dátuábyrgdarin hevur at hava eftirlit við viðgerðini hjá dátuviðgeranum.

Dátueftirlitið mælir til, at reglurnar í GDPR um atferðarkodeks og certificering koma við í lógaruppskotið.

Ásetingarnar í artikkul 40-43 í GDPR áseta skyldu fyri ES-limalondini at eggja til, at sokallaði atferðarkodeks og certificeringsskipanir, sum stuðla undir at krøv í GDPR verða hildin, verða gjørdar, umframt at áseta reglur um eftirlitsskipanir fyri ávikavist atferðarkodeks og certificeringsskipanir. Tá atferðarkodeks ella certificeringsskipanir eru góðkendar, kunnu tær –

av dátuábyrgdarum o.ø., sum fylgja teimum – verða nýttar sum skjalprógv fyri, at reglurnar í GDPR eru fylgdar.

Ásetingarnar í artikkul 40-43 eru ikki við í lógaruppskotinum. Hetta er m.a. tí, at ásetingarnar áleggja ES-limalondunum eina skyldu at eggja til nýtslu av atferðarkodeksum og certificeringum, og at hetta tí illa letur seg umseta og passa inn í eina føroyska lóg. Harumframt er mett, at tað er ov tungt at gera eina serføroyska skipan hesum viðvíkjandi. Víst verður tó á, at í tann mun tað eru atferðarkodeks og certificeringsskipanir á ávísum økjum, so kunnu hesar ganga inn í síðvenju hjá Dátueftirlitinum.

Føroya Politi hevur gjørt ítøkiligar viðmerkingar um nágreiningar o.a. í § 78 um revsing og § 79 um fyrisitingarlig sektaruppskot.

Flestu av viðmerkingunum frá Føroya Politi eru gingnar á møti.

20. Málsligar viðmerkingar
Gjaldstovan og **KT-felagið** hava víst á, at tað á síðu 33 í uppskotinum, sum hevur verið til ummælis stendur *reglulig grannskoðan*, sum dømi um trygdartiltak, og at hetta eigur at verða *reglulig skoðan.*

Betri mælir til, at *tjóðarligan uppruna* verður broytt til *etniskan uppruna* í § 11. **Ílegusavnið** og **Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu** skjóta upp, at *treysleiki* í § 46, stk. 1 verður broytt til *haldføri*.

Faroe Law og **Betri** vísa á, at *einhvør* í m.a. § 6, nr. 1 eigur at vera *ein og hvør*.

Løgmansskrivstovan hevur tikið viðmerkingarnar til eftirtektar.

M.a. **Fróðskaparsetri** og **Familjufyrisitingin** gera vart við, at málið í lógaruppskotinum er tungt og ringt at skilja.

Løgmansskrivstovan ásannar, at lógaruppskotið kann vera torført at skilja fyri fólk, sum ikki kenna til dátuverndarætt, sum er eitt torskilt rættarøki.

Løgmansskrivstovan hevur í sambandi við arbeiðið við lógaruppskotinum í mestan mun roynt at føra víðari orðingar o.a. úr galdandi lóg fyri at lætta um, og harvið ikki broyta hugtøk o.s.fr., sum fólk eru von við.